## Norðmenn kenna seg sviknar

Norðmenn kenna seg sviknar av svium, nú Noreg og ES samráðast um nýggjar handilstreytir í sambandi við, at tíggju lond afturat koma upp í ES. ES hevur kravt, at Noreg skal rinda 3,5 milliardir krónur um árið fyri marknaðaratgongdina, men tað halda norðmenn vera alt ov nógv.

Hesum er svenski forsætisráðharrin, Gøran Persson, ikki samdur við teimum í. Fyrr í vikuni segði hann við norska útvarpið, at Noreg noyðist at rinda tað sama sum onnur lond. Hann vísti á, at tað hevði verið heilt órímiligt, um Noreg, sum er tað ríkasta landið í Evropa, skuldi goldið minni enn Svøríki, sum hevur eina skiftandi búskapargongd.

Norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, hevur eina aðra áskoðan. Hann sigur, at Noreg er ikki limur í ES og eigur tí heldur ikki at gjalda, sum var landið limur.

## Fleiri deyð í ferðsluni

Seinastu hagtølini frá donsku ferðslumyndugleikunum vísa, at umleið 450 fólk doyðu í ferðsluni í Danmark í fjør. Tað er umleið fimm prosent fleiri enn í 2001. Somuleiðis vísa tølini, at umleið 9.200 danir fingu skaða í ferðsluni í 2002.

Stjórin í danska ráðnum fyri ferðslutrygd, Rene la Cour Sell, sigur, at sjálvt um vøksturin ikki er stórur, so er tað kortini hugvekjandi, at tað framvegis gongur tann skeiva vegin. Hann heldur tað eisini vera hugvekjandi, at ein triðingur av teimum, sum doyðu í ferðsluni í fjør, vóru yngri enn 25 ár, og at ein triðingur vóru eldri enn 65 ár.

Lene Espersen, løgmálaráðharri harmast ta skeivu gongdina og sigur hetta vera eitt prógv um, at tað er neyðugt at leggja uppaftur størri dent á ferðslutrygdina. Hinvegin iðrar hon seg ikki um, at stjórnin hevur spart á fleiri økjum, sum hava við ferðsluna at gera, og hon heldur ikki, at áhaldandi upplýsingartiltøk gera tann stóra munin. Bøtur og betri eftirlit við ferðini á vegunum geva betri úrslit, heldur ráðharrin.

## Leyp úr lyftu

Ein 22 ára gamal svii, sum var farin til Eysturríkis at royna seg á skíðum, liggur nú á sjúkrahúsi við brotnum ryggi.

Maðurin setti seg í eina lyftu niðan á fjallið, men niðankomin tordi hann ikki at royna skíðbreytina. Hann valdi tí at seta seg aftur í lyftuna oman av fjallinum. Hetta var klokkan fýra seinnapartin. Skíðbreytin var stongd, men lyftan virkaði enn. Men vanlukkutíð steðgaði lyftan, júst sum hon var á veg oman við tí 22 ára gamla svianum. Eftir at hava sitið ein tíma, gjørdist maðurin kaldur, samstundis sum ræðsla kom á hann, og hann gjørdi av at leypa úr lyftuni.

Úrslitið var, at hann breyt ryggin í tveimum støðum, men hann kann ugga seg við, at sambært læknunum fær hann ikki varandi mein av tí 10 metrar høga fallinum ella lopinum.

## Fjaldi seg í kufferti

Eftirlitsfólkini á markinum í Hongkong høvdu ilt við at trúgva sínum egnu eygum, tá tey fyri nøkrum døgum síðani lótu eitt kuffert upp. Hóast kuffertið bert var 54 ferðir 80 sentimetrar, funnu eftirlitsfólkini ein mann í tí.

Blaðið South China Morning Post skrivar, at tað var ein 24 ára gamal pakistani, sum hevði fjalt seg í kuffertinum, tí hann ætlaði sær til Hongkong. Hann hevði fingið ein indiskan vinmann at koyra seg í kuffertið og at taka seg við einum flogfari til Hongkong.

Tann 24 ára gamli maðurin sleppur ikki at síggja eitt kuffert fyribils, tí mánadagin varð hann dømdur hálvt annað ára fongsul fyri at hava roynt at koma sær ólógliga til Hongkong. Enn er ikki avgjørt, hvussu maðurin, sum átti kuffertið, verður revsaður.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Alt fleiri palestinsk børn fella fyri ísraelskum kúlum

**Ein kanning vísir, at ísraelskir hermenn skutu 115 óvápnað palestinsk børn í fjør**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Palestinsku myndugleikarnir hava leingi skuldsett ísraelsku stjórnina fyri miðvíst at gera seg inn á sivilfólkið í teimum palestinsku økjunum fyri á tann hátt at ræða fólkið frá at seta seg upp ímóti herinum. Palestinararnir hava eisini lagt herin undir at skjóta børn og ung, sjálvt um tey eru óvápnað.

Nú vísir ein kanning hjá amerikansku tíðindastovuni AP, at ísraelskir hermenn skutu 115 óvápnað palestinsk børn og ung í fjør. Tað er sambært tíðindastovuni 50 prosent fleiri enn árið fyri. Tey flestu vórðu skotin, meðan tey stóðu og eygleiddu samanbrestir millum ísraelskar hermenn og víðgongdar palestinar, ella tí tey steinaðu ísraelsk stríðsakfør. Niðurstøðan hjá AP er, at ísraelski herurin megnar ikki at halda palestinska uppreistrinum niðri uttan at drepa óvápnað sivilfólk.

Mannarættindafelagsskapir í Ísrael siga, at hermenninir hava alt ov leysar teymar, og at hermenninir verða ikki revsaðir, hóast teir skjóta óvápnað sivilfólk. Ein talsmaður hjá einum av teimum ísraelsku felagsskapunum sigur, at hermenninir leggja seg ikki eftir at skjóta børn og ung, men at tað tíverri er vorðið siðvenja, at hermenn verða ikki revsaðir, hóast teir gera tað.

Palestinsku myndugleikarnir finnast eisini hvassliga at framferðini hjá ísraelska herinum. Saeb Erekat, sum situr í palestinsku stjórnini, sigur, at talið á palestinskum børnum, sum fella fyri ísraelskum kúlum, er vorðið so stórt, at altjóða samfelagið eigur at kanna viðurskiftini.

Síðani palestinski uppreisturin byrjaði í september í 2000, hava 2.014 palestinar og 713 ísraelsmenn latið lív. Av teimum vóru 275 palestinsk og 72 ísraelsk børn. Nógv tey flestu ísraelsku børnini doyðu í palestinskum sjálvmorðsatsóknum.

# Spøkilsisskip



*Avstralska sjóverjan kom fyri nøkrum døgum síðani fram á hetta skipið, sum er skrásett á Taiwan. Tað løgna var, at einki fólk var umborð á skipinum, og avstraliumenn funnu heldur ongar bjargingarvestar umborð. Á myndini verður skipið, sum eitt línuskip, togað í havn á avstralsku útnyrðingsstrondini til nærri kanningar*

*Mynd: Reuters*

# Prestur hevði 3560 myndir við barnapornografi

**Ein prestur í Norðurnoregi hevði 3560 barnapornografiskar myndir á telduni í prestagarðinum. Hann er eisini undir illgruna fyri at hava havt kynsligt samband við ein smádrong**

ÓLEVNAÐUR
*Árni Joensen*

Ákæruvaldið í Troms og Finnmørkini í Norðurnoregi er nú liðugt við ákæruritið ímóti einum presti, sum varð koyurdur frá í fjør, eftir at tað var avdúkað, at hann hevði ein hóp av barnapornografiskum myndum inn á teldu síni í prestagarðinum. Presturin varð avdúkaður, eftir at fólk vóru farin at undrast á, hvar hendi í prestagarðinum, tá smádreingir javnan vóru og vitjaðu prest.

Nú er presturin ákærdur fyri at hava gjørt seg kynsliga inn á ein tíggju ára gamlan drong, og harafturat er hann ákærdur fyri at hava latið børnum og ungum ymiskt pornografiskt tilfar. Tað er ikki loyvt at lata fólki yngri enn 18 ár tílíkt tilfar.

Presturin hevur viðgingið, at hann hevði tær 3560 barnapornografisku myndirnar í telduni, og at hann hevur víst teimum ungu pornofilmar. Men hann vísir aftur ákæruni um, at hann skal hava havt kynsligt samband við tann tíggju ára gamla drongin.

Verður presturin dømdur sekur, kann hann fáa upp í hálvt fimta ára fongsul.

Bilar

Nr. 10 • hósdagur • 16. januar 2003 • 77. árg.

# Søluleiðarin hjá P/F Wenzel »– nú siti eg hinu megin borðið«

**Eftir at hava arbeitt sum bankamaður í fimtan ár, valdi Jóhan Petur Olsen at siga starvið í Føroya Sparikassa frá sær og royna nakað nýtt. Hálvan oktober í fjør tók hann við sum søluleiðari hjá P/F Wenzel í Havn.**




*Hálvan oktober í fjør tók Jóhan Petur Olsen við sum søluleiðari hjá P/F Wenzel. Eftir at hava arbeitt á vinnulívsdeldini hjá Føroya Sparikassa, situr hann nú hinumegin borðið, og sær hann nú hvussu tann veruliga arbeiðsdagurin er í eini vinnufyritøku.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

BILASØLA
*Magnus Gunnarsson*

35 ára gamli søluleiðarin hjá P/F Wenzel, Jóhan Petur Olsen, er føddur og uppvaksin á Argjum. Eftir at hann var liðugur við 10. flokk, sigldi hann í eini 3 ár. Hann var við ísfiskatrolara undir Føroyum, sigldi við farmaskipinum Líðartindindi hjá Traderline og við flaggskipi okkara Norrønu.

Eftir hetta fekk hann arbeiði í Føroya Sparikassa, og arbeiddi hann har sum "altmuligmand" í eitt ár, til hann fekk bjóðað lærupláss. Har hevur hann so verið seinastu fimtan árini, har hann arbeiddi við útláni og serliga innláni í mong ár. Seinastu trý árini var hann á vinnulívsdeildini. "Føroya Sparikassi var eitt sera gott arbeiðspláss, tað var gevandi og læruríkt fyri meg. Tó so, seinastu tíðina fór eg at hugsað um, at eg skuldu royna nakað annað her í lívinum. Skuldi eg skifta, so mátti tað verða nú, meðan eg hevði hug at royna aðrar avbjóðingar. Og knappliga fekk eg kjansin úti hjá P/F Wenzel, har eitt starv sum søluleiðari var leyst at søkja. Eg var so heppin, at teir spurdi meg, um eg var áhugaður í hesum. Eg hugsaði meg ikki ov leingi um, hevði eg gjørt tað, hevði eg kanska verið verandi í mínum trygga Sparikassa", sigur Jóhan Petur.

### Spennandi og gott arbeiðspláss

Jóhan Petur sigur at hann so avgjørt ikki hevur angrað, at hann tók hesa avgerð. "Hetta er eitt spennandi og gott arbeiðspláss, og starvsfelagar mínir eru fittir og góðir at samstarva við. Tað er sjálvandi ein lítil kollvelting at vera her í mun til í Sparikassanum, tað er sum um, at eg nú sitið á hinari síðuni, og síggi hvussu tann veruligi arbeiðsdagurin í einum vinnufyritøku gongur fyri seg. Eg má ásanna, at hetta eisini styrkir um mínar starvsroyndir. Í felag skulu vit kunna geva hesi fyritøku nógv góð ár afturat. Vit skulu minnast til, at Ford er ikki nakar unglingi hóast alt. Um 2 ár ella so verða tað 80 ár, síðan Wenzel Petersen fekk umboð fyri Ford bilarnar í Føroyum".

Tá vit spyrja Jóhan Petur um framtíðina og ætlanir felagsins, sigur hann at framtíðarætlnanir altíð eru spennandi. "Vit vita, at bilasøla er ein viðkvom vinna, tá ið vit hugsað um samfelagsgongdina sum heild. Gongst væl í samfelagnum, ja so gongst eisini væl at selja bilar, og tað hava undanfarin ár eisini víst. Gongst minni væl ja so vilja fólk helst bíða við at keypa bilar, men so mugu vit bert gera ein eykað innsats, fyri at vit kunnu hóra undan. Vit verða kanska noyddir at seta eyka kreftir inn fyri at finna aðrar og nýggjar vegir at servicera okkara kundar. Og tað er akkurát, tað sum er so ótrúliga umráðandi. Fyri at kunna varðveita okkara kundar og fáa nýggjar, er tað sera umráðandi at veita eina so góða tænastu, at vit klára at halda tær avtalur, sum verða gjørdar, og at vit eru rættvísir tá talan er um okkara produktir. Kappingin er hørð, tað vita vit, so tað er neyðugt at fylgja hesum málsetningi, og tað gera vit, tá hvør einstakur í fyritøkuni er samdur um hetta.

Vit vilja seta meira kreftir inn uppá at selja til vinnufyritøkur, tað er ein bólkur sum vit skulu til at uppsøkja nærri, vit fáa nevniliga tvey spildurnýggj model heim í ár, so tað er bara at takað fatt. Eitt annað sum vónandi verður liðugt um ikki ov langa tíð, er okkara heimasíða www.wenzel@.fo. Heimasíður eru nakað sum fólk "fokusera" nógv uppá í dag, so tað er ein sjálvfylgja, at okkara heimasíða eisini kemur at virka optimalt", sigur Jóhan Petur Olsen. Vit takka fyri samrøðuna og ynskja Jóhan Peturi góða eydnu við nýggja starvinum